# Oddvá setur skjøtil á

**Hon hevur drúgvar arbeiðsroyndir innan føroyska mentanarheimin, og í ár skjýtur hon byrjunarskotið til tjóðarhátíð Føroya. Oddvá Nattestad, samskipari av Listastevnu Føroya, setir ólavsøkuna 2004**



*Oddvá Nattestad, samskipari av Listastevnu Føroya, setir ólavsøkuna í ár*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað verður Oddvá Nattestad, sum fer at seta ólavsøkuna í ár.

– Tað taki eg sum ein stóran heiður, og eg gleði meg nógv til ta løtuna, sigur hon.

Oddvá starvast dagliga sum samskipari av Listastevnu Føroya, og kann ein tí siga, at hon hevur ein serligan forkærleika fyri, at mentanini skal vera lív lagað í Føroyum.

### Nógv at tosa um

Oddvá Nattestad sigur, at tað er nógv, ein kann tríva í í eini ólavsøkurøðu. Hon er byrjað at spæla sær við nakrar møguleikar, men enn er ikki nakað fest niður á pappír.

– Ólavsøkan er endan á øllum summarstevnunum, og samstundis byrjanin á tingsetuni. Ringrásin við byrjan og enda kann verða eitt upplagt evni, nevnir hon. Hon leggur afturat, at hon hevur hugsað nógv um, hvat orðatakið »Sunn sál, sunt likam« man merkja.

– Eg haldi, at tað hevur okkurt við javnvág at gera. Javnvág í lívinum, sum vit øll stremba eftir.

Íblástur og hugskot finnur hon í fjølmiðlunum. Tíðindum bæði úr Føroyum og uttan úr heimi, umframt teimum bókunum, hon hevur lisið.

– Tað er týdningarmikið at minnast til, at ólavsøkan er ein søguligur veitsludagur, so tað er nógv at taka fyrilit fyri.

### Mentan í hásætið

Sum samskipari av Listastevnu Føroya hevur Oddvá Nattestad eitt av teimum fáu størvunum í Føroyum, sum eru innanfyri at samskipa mentanarlig tiltøk. Hon hevur verið virkin bæði í MáF og Havnar Sjónleikarfelag, og bankar hjartað hennara serliga fyri listarligum arbeiði – kanska serliga sjónleiki.

– Eg haldi, at tað er ógvuliga týdningarmikið, at eitt land sum Føroyar hevur mentanarlig tiltøk. Tey seta síni fingramerki á eitt land, og vit kunnu bert takka fyri, at vit sjálvi eiga so nógv dugnalig listarfólk.

Oddvá heldur, at føroyingar sum heild raðfesta list høgt, og tað sæst eisini aftur á vitjanartølunum hjá Listastevnuni í fjør. Tá vóru eini 8000 fólk til tey tiltøkini, ið skipað varð fyri.

### Fyrsti spírin

Spurd um, hvaðani stóri mentanaráhugin er, svarar Oddvá:

– Eg eri fødd og uppvaksin í Gøtu, og eg ivist ikki í, at tað er har tann fyrsti spírin er komin.

Hon minnist, hvussu nógv fólk plagdu at koma á gátt. Bæði úr Gøtu og aðrastaðni frá. Nógv varð eisini sungið úr Songbók Føroya fólks. Harumframt spældi hon eisini sjónleik í Losjuni í Gøtu.

Komin til Havnar fór hon á skeið hjá Eyðuni Johannesen. Skjótt fekk hon tilknýti til Havnar Sjónleikarfelag og MáF, umframt at hon hevur sitið í nevndini hjá Nordisk Amatørteater í 10 ár.

– Eg havi altíð verið áhugað í mentan. Kanska serliga sjónleiki, viðurkennir hon og sigur í sama andadrátti, at hon vónar, at tað fer at gangast Tjóðpalli Føroya væl.

### Áhugavert starv

Síðani januar 2001 hevur Oddvá starvast sum samskipari av Listastevnu Føroya. Hetta er eitt arbeiði, ið týðiliga hevur hennara stóra áhuga. Nú Oddvá skal samskipa Listastevnuna á fjórða sinni, verður í hesum døgum arbeitt uppá tær fyrireikingarnar, ið enn vanta.

– Hetta er eitt ógvuliga áhugavert starv. Tað er nógv, ið skal hanga saman. Bæði viðvíkjandi nøvnum, ið skulu framføra og sjálvandi eisini fíggjarliga.

At vera samskipari av Listastevnuni merkir so eisini, at arbeitt verður við henni alt árið.

Oddvá sigur, at tað er ógvuliga spennandi at fyrireika Listastevnuna. Sambært henni, so eru føroyingar ógvuliga tilvitaðir um, hvat tað er, teir síggja og hoyra. Harumframt duga teir eisini at vera kritiskir. Og slíkt er við til at menna eitt mentanarligt tiltak sum Listastevnuna.

– Eg rokni eisini við, at eg eri vald til at seta ólavsøkuna orsakað av mínum starvi. Og tað gleði meg eisini til, sigur Oddvá Nattestad, sum ólavsøku aftan setir ólavsøkuna 2004.

### Blá bók

**Navn:** Oddvá Nattestad
**Fødd:** 14. mars 1948 í Gøtu
**Hjúnastøða:** Gift við Niels Nattestad
**Børn:** Finnbjørg, Beinta og Ásbjørn
**Ommubørn:** Óluvá, Dánjal, Eyðbjørg, Niels, Jóhan og ein ommudóttir, sum ikki hevur fingið navn enn
**Útbúgving:** Lærari í 1976
**Størv:** Hevur starvast sum lærari í Eysturskúlanum og Hoyvíkar skúla. Var eitt skifti á kunningardeildini hjá Tórshavnar
**Býráð:** Oddvá hevur eisini gjørt barnaútvarp í sjey ár frá 1982-89, umframt at hon hevur arbeitt í MáF. Harumframt hevur hon sitið í nevndini hjá Sjónleikarafelagnum og NAR (Nordis Amatør Teater) umboðandi Føroyar. Starvast nú uppi í Norðurlandahúsinum sum samskipari av Listastevnu Føroya á fjórða ári.



ØLLUM FØROYA FÓLKI VERÐUR YNSKT EINA GÓÐA ÓLAVSØKU




Opið: Mánadag - fríggjadag kl. 9.00 - 17.00
annars sambært avtalu
*Vøruskrá kann fáast!*

Øllum føroya fólki verður ynskt eina góða ólavsøku



Annika
ER AFTURKOMIN

HÁRFRÍÐKANARHØLLIN
TEL 31 34 49 · HOYDALSVEGUR 40

FLEIRI GÓÐ TILBOÐ TIL ÓLAVSØKUNA, EISINI HAVA VIT STÓRT ÚRVAL AV STÓRUM STØDDUM





NÓGV NÝGGJ VØRA KOMIN TIL ÓLAVSØKUNA

VIT YNSKJA VIÐSKIFTAFÓLKI OKKARA EINA GÓÐA ÓLAVSØKU

Ka-Ki
KLAKSVÍK · TEL 45 59 02

NORA
Norrønt Atlantssamstarv

**NORA** fyriskipar og stuðlar verkætlanarsamstarvi millum Føroyar, Grønland, Ísland og Noreg

**NORA** vil fegin hava samstarvsfelagar úr øðrum grannalondum eisini

**NORA** kann vera við at fíggja verkætlanum í øðrum programmum

**NORA** mennir og stuðlar vinnuligum netverki í Nordatlantshavi

Bryggjubakki 12 ſPostboks 259 ſ110 Tórshavn
Tel +298 35 31 10 ſFax +298 35 31 01
nora@nora.fo ſwww.nora.fo